# Nýggja samgongan onga virðing fyri fólkakirkjuni


*Tað boðar ikki frá góðum, at samgongan hevur sett ein limí brøðrasamkomuni í landsstýrið at umsita kirkjumál, Hans Jacob Joensen, bispur*

**– Tað er heilt burturvið, at nýggja samgongan hevur sett ein lim í brøðrasamkomuni í landsstýrið at umsita fólkakirkjuna, sigur Hans Jacob Joensen, bispur**

LANDSSTÝRISMAÐURIN OG FÓLKAKIRKJAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Nýggja samgongan virðir ikki fólkakirkjuna.

Tað sigur Hans Jacob Joensen, bispur.

Hann er heilt illa við av, at nýggja samgongan hevur sett Jógvan á Lakjuni í landsstýrið at umsita kirkjumál.

Jógvan á Lakjuni er ikki limur í Fólkakirkjuni. Tvørturímóti er hann limur í brøðrasamkomuni, sum er rættiliga ósamd við fólkakirkjuni í nógvum viðurskiftum, eitt nú í grundleggjandi viðurskiftum sum barnadópi og konfirmatión.

– Eg dugi heilt einfalt ikki at skilja, at nýggja samgongan ikki virðir fólkakirkjuna sum ein trúarfelagsskap har ein skal vera limur, sigur Hans Jacob Joensen.

Hann sigur, at tað er ikki annað enn eitt heilt natúrligt krav, at tann, sum stendur á odda fyri fólkakirkjuni í landsstýrinum, eisini er limur í henni, sigur bispur.

Hann ivast eisini í, um tað ikki er í stríð við grundlógina, at vit hava ein landsstýrismann í kirkjumálum, sum sjálvur ikki er limur í fólkakirkjuni.

– Grundlógin krevur, at drotningin, sum evsta vald í kirkjuni, er limur í fólkakirkjuni. Tí vildi eg mett, at eisini tey í Føroyum, sum eru beint undir drotningini, eisini skulu vera limir í fólkakirkjuni.

### Samvitskutrupuleiki

Hans Jacob Joensen hevur eisini hug at venda spurninginum og spyrja um Jógvan á Lakjuni, ella brøðrasamkoman, høvdu góðtikið, at ein prestur, ella ein limur í onkrari heilt aðrari samkomu, gjørdust ovasti leiðari í brøðrasamkomuni?

– Tað er júst hetta, sum er heilt burturvið og tí er tað sjálvsagt, at tann landsstýrismaður, sum umsitur kirkjumál, eisini er limur í fólkakirkjuni, skoytir bispur uppí.

Hann sigur, at hetta kann skjótt gerast ein stórur samvitskutrupuleiki hjá landsstýrismanninum.

– Hvussu verður um landsstýrismaðurin skal til at seta ymisk viðurskifti í gildi, sum stór ósemja er ímillum kirkjuna og brøðrasamkomuna um?

– Hvar fer landsstýrismaðurin tá at stilla seg? Hevur hann tvær samvitskur, spyr bispur.

Hann sigur, at ert tú limur í einum trúarsamfelag, ert tú loyalur ímóti tí. Men kann loyaliteturin hjá Jógvani á Lakjuni býtast í tvey? spyr bispur.

Hann sigur eisini, at í Danmark er tað bara einaferð komið fyri, at ein kirkjumálaráðharri ikki var limur í fólkakirkjuni.

Men tann ráðharrin var limur í eini fríkirkju, sum at kalla var undir fólkakirkjuni. Annars verður tað mett at vera sjálvsagt, at kirkjumálaráðharrin er limur í fólkakirkjuni.

### Boðar ikki frá góðum

Hans Jacob Joensen, bispur, sigur at tað boðar ikki frá góðum, at samgongan setir ein lim í brøðrasamkomuni at umsita kirkjumál.

Millum annað hugsar hann um, at ætlanin er at yvirtaka kirkjuna.

– Við at velja ein lim í brøðrasamkomuni at umsita krikjumál, tykist tað sum um at politiska valdið heldur, at tað kann fara við kirkjuni, akkurát, sum teimum lystir.

– Tað er eitt sindur provokerandi ímóti kirkjuni og eg hevði aldrin hugsað mær, at slíkt kundi koma fyri um okkara leiðir.

Og hann spyr, hvat ætlanin hjá politiska valdinum er við fólkakirkjuni.

Hans Jacob Joensen sigur, at tað hevði verið lætt at loyst hendan trupulleikan.

– Trupuleikin kann loysast soleiðis, at Jógvan á Lakjuni verður verandi landsstýrismaður í mentamálum. Fólkakirkjan skal eisini framhaldandi verða verandi í mentamálaráðnum. Men tað skal kortini vera ein annar landsstýrismaður, ella løgmaður sjálvur, ið er limur í fólkakirkjuni, sum umsitur kirkjumál.

Hann sigur, at soleiðis kann hesin trupuleikin loysast, uttan at seta fólkaræðið til viks, tí tað eru bara kirkjumál, sum eru eitt serligt øki.

– Tað er onki annað málsøki, sum krevur, at fólk eru limir, sigur bispur.

Tað eydnaðist ikki at fáa eina viðmerking frá Jógvani á Lakjuni, áðrenn blaðið fór til prentingar.

### Danskir serfrøðingar um kirkjumálaráðharrar og fólkakirkjuna

*August Roesen, kirkjurættsserfrøðingur, doktar jur. hevur skrivað í Dansk Kirkeret í 76:*

»Der er ikke i lovgivningen fastsat, at kirkeministeren skal være medlem af folkekirken men det har hidtil været betragetet som en selvfølge, at den enkelte person, der indtager en så fremtrædende og ledende stilling i kirkens styrelse, skal være medlem af den«.

*Preben Esbersen, doktor jur og eisini serfrøðingur í donskum kirkjurætti, skrivar í 1993:*

»Der er ikke i lovgivningen fastsat, at kirkeministeren skal være medlem af folkekirken eller den evangeliske lutheriske kirke. Roesen anfører, at det har hidtil været betragetet som en selvfølge, at den enkeltperson, der indtager en så fremtrædende ledende stilling í kirkens styrelse, skal være medlem af denne. Roesen peger dog selv på, at kirkeministeren i årene 68-71 som medlem af en frimenighed stod udenfor folkekirken. Det må formentlig i dag med Zahle antages, at der ikke kan stilles noget retligt krav om, at kirkeministersen skal tilhøre den evangeliske lutheriske kirke eller være medlem af folkekirken.«



# Tíggju ár í Sýsluni

**Í vikuni eru liðin 10 ár, síðan barnagarðurin Sýslan í Sørvági lat upp. Hetta verður hátíðarhildið alla vikuna**

BARNAANSING
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*


*Tær spældu væl innandura hendan dagin, Sosialurin var og vitjaði*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Sørvági:** Tað eru liðin 10 ár, síðan barnagarðurin Sýslan, sum tann fyrsti í Vágum, lat upp. Hettta verður hátíarhildið við ymsum tiltøkum hesa vikuna.

Hesi 10 árini, barnagarðurin í Sørvági hevur verið til, hava umleið 170 børn gingið har. Tey fyrstu teirra, sum komu í Sýsluna, ganga í dag í 10. flokki í Sørvágs skúla og síðan eru allir aldursbólkar niðureftir til tey trý ára gomlu í bygdini.

Ymisk tiltøk hava verið og verða hesa vikuna. Eitt nú eru listaframsýning í barnagarðinum alla vikuna. Listaverkini eru slík, børnini sjálv hava gjørt.

Ein av døgunum framføra næmingar úr áttanda og níggjunda flokki í Sørvágs skúla, sjónleik, tey sjálv hava gjørt yvir evnið »Tá vit gingu í Barnagarð«.

Fríggjadagin verður opið hús millum klokkan 15.00 og 18.00 har øll eru vælkomin inn á gólvið.

Tað hava nógv starvsfólk arbeitt í Sýsluni hesi tíggju árini. Ein teirra er Nancy Selfoss, sum hevur arbeitt frá byrjan til dagin í dg, sigur Súsanna á Stongum, sum er leiðari í barnagarðinum Sýsluni í Sørvági.

Navnið Sýslan kemst av, at barnagarðurin heldur til í gomlu sýslumanshúsunum í Sørvági.

Tá byrjað var í 1994, var pláss fyri 20 børnum umframt fýra við serligum tørvi. Í dag er pláss fyri 36 børnum.

Hølsviðurskiftini eru ikki tey bestu, og tørvurin á barnaansing er alsamt vaksandi, og tað hevur Sørvágs Kommuna eisini ásannað.

Farið er undir fyrireikingar til ein stóran dagstovn í Sørvági, sum skal rúma umleið 100 børnu í bæði vøggustovu og barnagarðsaldri. Umframt fáa tey, sum hava serligan tørv, um stutta tíð heilt nýggj og stásilig høli at fara í.


*Føroysk ull verður vaskað, tøvd og litað, áðrenn hon verður gjørd til eitt listaverk, sum hongt verður á veggin.*
*Mynd: Edvard Joensen*


*Hesir vildu heldur vera úti í kavanum og gera kavamann og Pingu-hús*
*Mynd: Edvard Joensen*


*Børnini gera rættilig listaverk, meðan tey eru í Sýsluni. Á framsýningini, sum er á loftinum hesa vikuna, síggjast málninar, sum gjørdir eru á silvurpappír, verk av skeljum, umframt bæði glasmálningar og onnur listaverk.*
*Mynd: Edvard Joensen*